# Uppgávur hjá Matrikkulstovuni einskiljast

**Jacob Vestergaard sigur, at ætlanin er at bjóða ein part av arbeiðnum hjá Matrikkulstouni, út til privat at røkja**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú verður arbeitt við at broyta bæði matrikkullógina og Matrikkulstovuna

Tað fortaldi Jacob Vestergaard, landsstýrismaður á landsfundi Fólkafloksins leygardagin.

Jacob Vestergaard segði, at ætlanin er at broyta matrikkullógina soleiðis, at tað skal verða lættari og einfaldari at býta jørð sundur í smærri stykki.

Somuleiðis verður arbeitt við at bjóða ymsar uppgávur hjá Matrikkulstovuni út, so at alt, sum hevur við landmáting og uppmáting at verður latið upp í hendurnar á privatum at røkja.

- Tað er ein uppgáva, sum fleiri privatar fyritøkur saktans kunnu gera og tað kundi eisini ført við sær, at bíðitíðin kundi verðið munandi styttri.

Leikluturin hjá Matrikkulstovuni skal so verða at hon verður ein skrásetingar- og góðkenningarmyndugleiki, segði Jacob Vestergaard.



*Jacob Vestergaard arbeiðir fyri at broyta bæði matrikkullógina og Matrikkulstovuna*

# Nærkast eini avgerð um skúladepilin í Hovi

**Gongur sum ætlað, verður endaligur sáttmáli gjørdur 24. januar, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Dagurin, tá ið arbeiðið at gera nýggja skúladepilin í Hovi, nærkast alsamt.

Tá ið Landsverk bjóðaðu nøkrum byggifeløgum at verða við í úttbjóðingini, var tað bara ein einasta fyritøka, MT Højgaard, sum vísti áhuga fyri at byggja skúlan.

Tí varð ikki hildið at verða ráðiligt at bjóða skúladepilin út. Ístaðin er landsverk farin undir samráðingar við MT Højgaard um at byggja depilin.

Landsverk og MT-Højgaard hava nú skrivað undir eina partalagsavtalu um skúlan, upplýsti Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, á landsfundi Fòlkafloksins leygardagin.

Hann segði, at í næstu viku verður arbeiðið liðugt at projektera skúlan og tá verður alt tilfarið sent MT Højgaard og saman við teirra undirveitarum, fer byggifelagið tá at roknað prísin út.

- Tað næsta stigið verður so at samráðast um eina sáttmála við MT-Højgaard um at byggja skúlan innanfyri fíggjarligur karmarnar upp á 60 milliónur, sum Løgtingið hevur samtykt at játta til endamálið. Í hesum sambandi verða eisini tillagingar gjørdar í projektinum, so at prísurin ikki fer upp um 60 milliónir.

Føra hesar samráðingar á mál, er ætlanin at gera sáttmála við MT Højgaard tann 24. januar um at byggja skúlan, segði Jógvan á Lakjuni.



*Í næstum verða samráðingar við MT-Højggard um at byggja skúladepilin í Hovi og gongst sum ætlað, verður sáttmáli undirskrivaður 24. januar, segði Jógvan á Lakjuni, vm, her saman við Óla Breckmann á landsfundi Fólkafloksins leygardagin*

# Fleiri sjónvarpsrásir til føroyingar

**Landsstýrismaðurin í mentamálum kannar møguleikarnar so at tey, sum betala kringvarpsgjald skulu fáa fleiri rásir afturat Sjónvarpi Føroya**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Gongur sum landsstýrismaðurin í mentamálum ætlar, sleppa føroyingar skjótt at síggja fleiri sjónvarpsrásir.

Á Landsfundinum hjá Fólkaflokkinum leygardagin, fortaldi Jógvan á Lakjuni, at hann arbeiðir fyri at geva føroyingum meiri fyri sjónvarpsgjaldið.

Tað, sum er farin at arbeiða fyri, er, at tey, sum betala sjónvarpsgjald, skulu fáa nakrar útlendskar rásir við í gjaldinum umframt Sjónvarp Føroya.

Hann vónar, at hetta kann bera á mál, so at føroyingar kunnu fáa einar fimm útlendskar rásir afturat Sjónvarp Føroya uttan at betala meiri í sjónvarpsgjaldi.

Í hesum sambandi nevndi hann almennu sjónvørpini í Noregi, DR og NRK.

Sum eina avleiðing av hesum sær hann fyri sær, at Sjónvarp Føroya bert skal gera føroyskar sendingar.

Hann vísir á, at eitt eitt endamál við Sjónvarpi Føroya, er, at tað skal vera við at varðveita og menna føroyskt mál og føroyska mentan og tí heldur hann, at tað er ein gongd leið at fara at lata Sjónvarp Føroya gera føroyskar sendingar burturav og brúka alla orku upp á tað.

Hann sigur kortini, at enn er ov tíðliga at siga nakað um, nær hann kemur á mál við hesum, ella um tað fer at eydnast yvirhøvur.

Í løtuni eru samráðingar við Føroya Tele um at brúka teirra sendinet til endamálið.



*Hesir vóru á landsfundi hjá fólkaflokkinum, leygardagin og tey hoyrdu landsstýrismannin fortelja, at gongst sum ætlað, fara teir at fáa meiri fyri sjónvarpsgjaldið*